# Øll busskoyring í Suðuroy hildin uppat: Krøvini komu alt ov seint

**Krøvini frá bussførarunum í Suðuroynni kosta so nógv, at vit mugu hava nakrar dagar at kanna tær fíggjarligu avleiðingarnar, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*



*Hósmorgunin vórðu allir bussarnir hjá Bygdaleiðum í Suðuroy settir. Eg skilji ikki mannagongdina, sigur stjórin á Strandferðsluni. Vit føla okkum hildnar til rukku, sigur Uni Mortensen, sum er talsmaður hjá bussførarunum í Suðuroy*

Tað kom eitt sindur óvart á stjóran á Strandferðsluni, at bussførarnir hjá Bygdaleiðum í Suðuroynni nú hava gjørt av at niðurleggja alla busskoyring.

Reidar Nónfjall sigur, at tað var ikki fyrrenn um trý tíðina hósnáttina, at bussførarnir í Suðuroynni boðaðu frá, at sum støðan var, kundu teir ikki taka koyringina uppaftur.

Sostatt helt øll koyring uppat beinanvegin hósmorgunin. Og tíansheldur stóðu bæði skúlanæmingar, tey, sum skuldu við Smyrli, og øll onnur, og bíðaðu til fánýtis eftir teimum hvítu og bláu bussunum og skiltu ikki hví teir ikki komu fram – fyrrenn tey hoyrdu útvarpið, sum stutt og greitt boðaði frá, at ongin koyring var hjá Bygdaleiðum í Suðuroynni.

Tað er ósemja um sáttmálaviðurskiftini hjá teimum, sum koyra bussarnar, sum nú hevur ført til, at busskoyringin er hildin uppat.

Men stjórin á Strandferðsluni sigur, at hann skilir ikki mannagongdina, sum suðuroyingar hava brúkt í hesum máli.

Strandferðslan hevur sáttmála við 29 arbeiðstakarar kring alt landið um koyring fyri Bygdaleiðir. Av teimum eru sjey í Suðuroynni

Sáttmálarnir við teir gekk út nú á nýggjárinum og tí tóku vit samráðingar við Bussfelagið, upp fyrst í november.

– Vit hildu, at vit vóru komnir undir land, men tann 21. desember samdust vit um at samráðast víðari til 1. februar um nøkur ávís viðurskifti.

Reidar Nónfjall sigur, at teir sjey bussførarnir í Suðuroynni eru í Bussfelagnum og tí ivaðist hann onga løtu í, at teir vóru við í avtaluni.

– Men annað jólakvøld fekk eg ein brævbjálva í gangin frá bussførarunum í Suðuroy, har tað stóð, at teir høvdu serstøðu í sáttmálasamráðingunum og at teir vildu hava viðurskiftini í rættlag áðrenn ársskiftið.

Hann váttar tó, at í samráðingunum fyri jól, hevði hann fingið at vita, at bussførarnir í Suðuroy høvdu eina serstøðu.

– Men tað kom ongantíð longri og tá ið avtalan við Bussfelagið varð gjørd, hevði eg ongan varhuga av, at bussførararnir í Suðuroynni ikki vóru við í henni. Semja bleiv tó um at hava fund mikudagin.

### Dýr krøv

Strandferðslustjórin sigur, at hann fekk heldur ongi krøv frá bussførarunum í Suðuroynni, hóast hann hevði biðið um tey, so at hann fekk fyrireika seg til samráðingarnar.

– Ikki fyrrenn á sjálvum samráðingarfundinum mikudagin vórðu krøvini løgd fram. Men tað var við teirri treyt, at semja fekst um tey á sama fundi.

Reidar Nónfjall vil ikki siga, hvørji krøvini eru, ella hvat tað er fyri serstøða, sum bussførarnir í Suðuroy hava.

– Men tilsamans vóru krøvini frá bussførarunum í Suðuroy so dýr, at boðaði frá, at eg mátti hava eina viku til at kanna tær fíggjarligu avleiðingarnar fyri Strandferðsluna og landskassan. Og eg helt, at vit høvdu eina avtalu um at hittast aftur 10. januar.

Hesum mótmæltu bussførarnir í Suðuroynni ikki. Men kortini hava teir so havt eina aðra uppfatan av støðuni og tí hava teir lagt koyringina niður.

– Hetta skilji eg ikki og eg haldi, at tað er skeivt, tí er havi ikki skilt støðuna soleiðis, at samráðingarnar eru slitnaðar, sigur Reidar Nónfjall.

Hann sigur, at tað, sum nú hendir, er, at Strandferðslan fer at gera tað fíggjarliga roknistykkið upp, sum hann hevur lovað bussførarunum í Suðuroynni. Meiri fær hann ikki gjørt, sigur hann.

# Bussførarar í Suðuroy: Vit føla okkum hildnar til rukku

**– Vit mugu fáa eitt útspæl frá Strandferðsluni, sum vit kunnu taka í álvara, sigur Uni Mortensen, sum er talsmaður hjá bussførarunum í Suðuroynni, sum nú hava lagt arbeiðið niður**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

– Vit føla okkum hildnar til rukku av Strandferðsluni.

Tað sigur Uni Mortensen í Øravík, sum er talsmaður hjá bussførarunum í Suðuroynni.

Í gjáramorgunin løgdu teir arbeiðið niður, tí at teir kundu ikki semjast við Strandferðsluna um ein nýggjan sáttmála, eftir at tann gamli sáttmálin gekk út á nýggjárinum.

Uni Mortensen sigur, at tað kann ikki koma óvart á Strandferðsluna, at bussførarnir í Suðuroynni hava lagt arbeiðið niður.

– Sjálvsagt fær tað avleiðingar, tá ið avtalur ikki verða hildnar, sigur hann.

Hann sigur, at tað stendur í sáttmálanum, at samráðingar um nýggjan sáttmála skulu byrja eitt hálvt ár áðrenn tann gamli gongur út.

– Men hóast fleiri áheitanir hetta seinasta hálva árið um at taka samráðingar upp, hevur Strandfeðrslan ikki viljað samráðst fyrrenn í november.

– Svarið, vit annars hava fingið er, at tað er onki at samráðast um, tí koyringin skal privatiserast og so er ongin orsøk til at gera sáttmála.

Uni Mortensen váttar, at eisini bussførararnir í Suðuroynni vóru við í samráðingunum hjá Bussfelagnum.

– Men har kom kinkur í stevið og tvístøða tók seg upp í Bussfelagnum um samráðingarnar. Vit høvdu annars eina greiða avtalu í felagnum um, hvussu farast skuldi fram, og tað avtaluna ætla bussførarnir í Suðuroynni at halda seg til.

Orsøkin til tvístøðuna í bussfelagnum er, at bussførarar norðanfjørðs eru farnir frá teirri avtalaðu kósini, sigur talsmaðurin hjá førarunum í Suðuroynni. Tí samráðast bussførarnir í Suðuroynni fyri seg sjálvan.

Uni Mortensen sigur, at higartil í samráðingunum hava teir ikki kunna tikið Strandferðsluna í álvara.

– Brævaskiftið ímillum okkum og Strandfersluna vísir, hvussu lítil hugurin hjá Strandfersluni er.

Hann sigur, at bussførarnir í Suðuroynni strektu seg heilt til tann mikudagin 3. januar.

– Men heldur ikki á tí fundinum hevði Strandferðslan nakað sum helst at vísa á. Og tá føla vit okkum hildnar fyri gjøldur. Vit føla, at Strandferðslan hevur onki gjørt, uttan at halda bussførarunum til og tað vilja vit ikki góðtaka, sigur Uni Mortensen.

Hann sigur, at tað er ongin orsøki til at hava ein sáttmála, um hann ikki verður hildin. Tað er heldur ongin orsøk til at hava nakrar tíðarfreistir í sáttmálanum, um tær ikki skulu haldast.

– Hvussu kann nakar halda, at tað ikki fær avleiðingar at tíðarfreistir ikki verða hildnar. Eg skilji ikki, hví Strandferðslan ikki kann halda seg til ein sáttmála, hon sjálv hevur gjørt. Tað einasta, vit vilja, er, at fáa skipað viðurskifti.

Talsmaðurin hjá bussførarunum í Suðuroynni sigur, at orðingarnar, sum Reidar Nónfjall legði fram á fundinum hósnáttina, vóru so leysar, at tær kundu ikki góðtakast.

– Og hann visti væl, at avleiðingin av tí bleiv, at koyringin helt uppat. Og nær hon verður tikin uppaftur, er púra óvist. Fyrsta treytin er, at vit fáa eitt útspæl frá Strandferðsluni, sum vit kunnu taka í álvara. Og eg haldi, at Strandferðslan hevur havt eitt hálvt ár ar rokna í. At hon ikki hevur rokað seg lidnað, er hennara trupulleiki

### Øll líka sømdir

Uni Mortensen sigur, at í stórum snýr ósemjan seg um, at bussførarnir í Suðuroynni vilja hava líka góðar sømdir, sum bussførarnir í Havn fáa fyri sama arbeiði. Hann sigur, at bussførararnir í Havn hava betri løn enn teir á bygd og tað heldur hann ikki er rímiligt.

Men heldur ikki hann fer í dýbdina við trupulleikanum.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 5. januar til hósdagin 11. januar

## Nýggjárskonsertin beinleiðis




*Sunnudagin fer Sjónvarp Føroya at senda nýggjárskonsertina við Føroya Symfoniorkestri og Manskóri beinleiðis úr Norðurlandahúsinum frá klokkan 19.30.*

*Tey seinnu árini hevur verið skipað fyri nýggjárskonsert í Norðurlandahúsinum, og hon verður aftur á skránni í ár.*

*Kórvenjari er Bjarni Restorff, og Martin Mouritsen er dirigentur.*

*Spæld verða verk eftir Haydn, Wagner, Grieg, Strauss og øðrum kendum komponistum. Eisini verður okkurt fólkalag á skránni.*

## Og so spæla Foreigner . . .

**Dagfinn Olsen ummælir**



Farna vikan hevur óivað verið hin heilt stóra sjónvarps- og útvarpsvikan hjá mongum. Jólini eru farin afturum bak og somuleiðis nýggjárshaldið.

Frídagar í hópatali og dagar, har øll sita inni. Einki er at fara út til. Eingin sølubúð hevur opið og eingin er at hitta á gøtunum. Innidagar.

Fyri nøkrum árum síðani kom ein bók, ið nevndist Ruskveðursbókin, ella okkurt tílíkt. Kanska hava summi nýtt hana hesar dagarnar, tí veðrið hevur onkran dag verið heldur keðiligt – tó ikki alla tíðina, tað skal sigast.

Og loftmiðlarnir gera sína skyldu hesar síðstu dagarnar, áðrenn farið verður um gátt til nýtt ár.

Jólaundirhald er ikki ein vøra, ið vantar. Men legði tó til merkis, at ikki øll børn hava eins lætt við at sita leingi og hyggja í kassan, meðan onnur børn dansa um træið, syngja og spæla. Longi, longi, longi.

Kanska dagsins ungdómar, teir smáu, ikki hava bindindi. Tá Zacharias Hammer á sinni skipaði fyri, var eisini talan um langar sendingar, men tær tóktust tó spennandi. Men kanska var tað bert tíðin, sjónvarpið var ungt og somuleiðis hyggjarafjøldin. Øll vóru ung sum hyggjarar, ung og óvon. Løtt at gera nøgd.

Ja, kanska er tað so. Ungu føroyingarnir eru vaksnir upp við teldu og Playstation. Filmum. Tað skal henda okkurt. Alla tíðina. Rúm er ikki fyri tómum sekundum. Eisini í ÚF hevur digitala tíðin við sær, at vanligar samrøður verða kliptar, so eingi suff, eingir andisteðgir, ongar sonevndar pausur til umhugsni koma við. Alt er snøgt og ikki minst skjótt. Einki óneyðugt fjas og eingi tóm sekund. Og meðan vit hvønn dag renna skjótari og skjótari, so mugu vit nú eisini lurta skjótari.

Kanska er tað so. Eitt jólatræ og nøkur rundanum, ein søga og nakað av tónleiki. Tað er ikki hóskandi til Playstation-ættarliðið. Samanber teir stoltu ungu harrarnar í SvF, sum hildu seg vera ov gamlar til nýggja telduspælið, ið er komið í samband við Bíbliuútgávu og undirvísing. Fittir vóru teir, men hóast alt bert 7 ára gamlir.

Tó so. Jólatræ og dansur er partur av jólunum. Annað var eisini á skránni. Bæði hjá SvF og ÚF. Gott tilfar. T.d. mundu Gjallajólini rúnarbinda fleiri.

### Pipar og Skál

Tey ungu, ið eru nakað eldri, fingu gott í beinið frá Jákupi Veihe og Sjúrða Skaale. Og ófør var skálað. Jú, teir duga at handfara tilfarið. Eisini tey eymu punktini. Skálingin í Ogga Gogga hevur fingið ilt í summi og hegnisliga var hetta havt á lofti. Teir eru óførir, Pipar og Salt. Har vóru tær flestu kryddurtir, ið hóskaðu. Kryddurtir hava nú einaferð tað við sær, at summum dámar tær einki. Antin tí, at smakkleykirnir ikki tola, ella tí tey ikki vilja ella tora at smakka.

Sjálvur er eg ikki í tí støðu, at nýggjársaftan er eitt stórt sjónvarpskvøld. Men tað er tað hjá fleiri. Nógv hendir úti slíkt kvøld, men var innanveggja onkra løtu og sá okkurt, og so er eisini hent við sjónbandatólinum, um ein ikki er inni alt kvøldið. Frálíki tónleikurin í ÚF, tá stóri pinnur hevur ført okkum inn í nýggja árið, er góður og væl hóskandi. Útvarp hevur tann fyrimun, at ein er ikki bundin av at venda eygunum ávísan veg, meðan ein fær tað við, ið har verður bjóðað.

Nú vit eru við tónleikin. Stóru løturnar áðrenn og eftir tíðindi, eiga ofta útlendskir bólkar. Kanska hevði verið fínt við føroyskum tónum onkutíð áðrenn og eftir døgurða gerandisdagar, hugsi eg, meðan boðað verður frá, at til klokkan verður 13, fara vit at hoyra bólkin Foreigner (ið sum kunnugt merkir fremmandur)!

## Bestubitar: Tey settu búgv 2/3




## Young Americans




## Tilvera - Pokémon

